## FM í frælsum ítrótti

Leygardagin komandi skipar Roysnið, vegna FÍF, fyri FM í frælsum ítrótti á bana. Kappast verður á Svangaskarði. Greinarnar, sum kappast verður í, eru 100 m, 400 m, 1500 m, 5000 m, longdarlop, trístøkk og kúluvarp.

Fyri at luttakað skal ein verða meir enn 15 ár á kappingardegnum, og limur í einum av feløgunum fyri frælsan ítrótt.

Tilmelding ferð fram á heimasíðuni hjá FÍF (www.athletics.fo)

FMU (FM fyri ung) verður 12 August á Svangaskarið. Henda kapping umfatar ung millum 10 og 19 ár. Meir er at frætta um hesa kapping á www.athletics.fo.

## Dunga nýggjur landsliðsvenjari



Tað verður 42 ára gamli Carlos Dunga, sum loysir Carlos Alberto Parreira av sum venjari hjá brasilska fótbóltslandsliðnum. Dunga er púrasta óroyndur sum venjari, men sum liðskipari hjá liðnum, sum vann gull í HM í 1994 er hann ein maður, sum hevur stóra virðing í heimlandinum.

Ikki minst man tað telja rætta vegin, at Dunga altíð sýndi stóran stríðsvilja, og júst tað var kanska tað, sum var størsta mangulvøran, tá Brasilia í summar ikki vann seg millum tey fýra seinastu í HM-kappingini. Og sjálvur sigur Dunga, at hann ætlar sær at verða líka avgjørdur sum venjari, sum hann var tað sum spælari.

**-mørk**

# Endiliga eydnaðist tað hjá Klaksvíkingi

**Við framúr endaspurti syrgdu klaksvíkingar fyri, at eingin ivi skuldi valda um, hvat 10-mannafar var tað besta í hesum róðrarárinum, ið var tað fyrsta, sum Klaksvíkingur hevur vunnið FM í**

**KAPPRÓÐUR**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*




*Klaksvíkingurin setti veruliga ferð á, tá teir í endaspurtinum løgdu Eysturoying væl og virðiliga aftur um seg*

*Mynd: Álvur*

Tað var sonn frøi á klaksvíkingum á Ólavsøku. Eftir turbolenta róðrarárið kendist møguleikin fyri, at ivi skuldi sáast um, hvussu stórt virði skuldi verða í FM heitinum, sum klaksvíkingar mest sum høvdu tryggjað sær undan síðsta róðrinum.

Soleiðis endaði tað ikki. Klaksvíkingur vann, og harvið hildu teir sjálvir seg hava staðfest, hvør stinnasta manningin í 2006 hevði verið:

– Vit vistu, hvat stóð upp á spæl. Tað hevur verið nógv tosað, og tað hevði verið øgiliga keðiligt, um vit høvdu vunnið FM og ikki á Ólavsøku. Hetta hevði framúr týdning fyri okkum. Vit kendu okkum hava nakað at prógva, og tað gjørdu vit. Hetta er úrslit av harðari venjing og miðvísum arbeiði. Vit hava gingið hundrað prosent upp í hetta, og vit eru ovurfegnir um úrslitið, var salutturin frá ovurfegnu manningini, sum ikki nýttist at brúka nógva orku fyri at fáa bátin upp á pláss. Hann var í handavending syftur upp á land og borin av fegnu viðhaldsfólkunum, sum vóru komin til Havnar at stuðla Klaksvíkingi.

Eysturoyingur var fremstur í startspurtinum, og Eysturoyingur var eina løtu, áðrenn teir komu á Molan, tað mesta av hálvari bátslongd frammanfyri Klaksvíking, sum eisini var aftanfyri Vestmenning, ið leingi var væl við.

Men so var tað, at Klaksvíkingur rættuliga gjørdi bart. Framvið Molanum og harvið frammanfyri stóru og spentu áskoðarafjøldini – ikki minst fjarðbúgvar og klaksvíkingar – munaðu tøkini hjá klaksvíkingi meiri, enn tey gjørdu hjá eysturoyingum. Tað reið eina løtu um snarið, men so glapp hjá Klaksvíkingi, og síðstu hundrað metrarnar tóktist tað sum um, at Klaksvíkingur hevði sett turboina til. Tá ið skotið brast, var munurin millum teir báðu fremstu tað mesta av einari bátslongd. Tað hevur verið mett sum sannførandi sigur á so stuttum teini.

Sigurin var søguligur. Hetta var fyrsta ferðin yvirhøvur, at Klaksvíkingur hevur vunnið FM, og hetta var fyrsta ferðin síðani 1949, at klaksvíkingar hava vunnið á Ólavsøku. Sosialurin ynskir Klaksvíkingi hjartaliga tillukku við FM heitinum.

At talan var um sunna kapping millum rættar ítróttarmenn vístu framúr manningarnar, tá ið tær takkaðu hvørjum øðrum fyri róðurin og róðrarárið.

Vestmenningar vístu við fínum avriki, at tað skal roknast við teimum næsta ár. Havnarbáturin var so mikið gestablíður, at hann hevði Skálabátin, Vágbingin og Nólsoyingin undan sær á mál. Harvið misti Havnarbáturin bronsumerkini í FM kappingini, sum teir annars lógu til at vinna. Tey fóru í staðin til Vestmanna.

**10-mannafør – Ólavsøku úrslitið**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Klaksvíkingur | 4:02.22 |
| 2 | Eysturoyingur | 4:05.03 |
| 3 | Vestmenningur | 4:09.05 |
| 4 | Skálabáturin | 4:13.11 |
| 5 | Vágbingur | 4:14.03 |
| 6 | Nólsoyingurin | 4:14.20 |
| 7 | Havnarbáturin | 4:15.06 |

# Sundabáturin og Sølmundur stavn um stavn

**Í umróðrinum eydnaðist tað teimum norðuri í Sundi at fáa bilbukt við meistararnar á Sølmundi og harvið at bjarga ólavsøkuhýrinum**

**KAPPRÓÐUR**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Fyri aðrur ferð í ár var púrasta javnt í oddinum, og so máttu Sundabáturin og Sølmundur enn eina ferð rógva nýggjan róður*

*Mynd: Álvur*

Tað var endurtøka av Jóansøkuni, tá ið uppgerðin millum 6-mannaførini við monnum var á skránni á Havnarvág.

Í Vági róðu Sølmundur og Sundabáturin umróður. Ta ferðina vann Sølmundur. Seinnapartin í dag var aftur neyðugt við umróðri millum hesar báðar bátarnar. Hesa ferðina var tað Sundabáturin, sum var fyrstur á mál.

Sundabáturin fekk betra startin, men tað var skjótt, at Sølmundur legði seg hálva bátslongd framum, og so tóktist tað sum um, at tað skuldi ganga, sum tað gjørdi á Jóansøku.

Men tað vildu teir umborð á Sundabátinum ikki. Teir fóru lutfalsliga tíðliga undir endaspurtin. Tak fyri tak tóku teir seg inn á Sølmund, sum ikki megnaði at svara aftur, og á málinum var eingin ivi um, at tað var Sundabáturin, sum hevði vunnið.

Harvið gjørdist ólavsøkuróðurin hjá teimum norðuri í Sundi ikki so galin kortini, eftir at tað hevði kenst sum vónbrot, tá ið meistararnir á Rituni ikki høvdu megnað meiri enn fjórða plássið.

Og umborð á Sølmundi fegnaðust teir um, at teir longu undan síðsta róðrinum høvdu tryggjað sær FM heitið.

Jarnbardur endaði á triðja plássinum á Ólavsøku, og Jarnbardur vann bronsumerkini í FM kappingini. Trý talið hevur fylgt Jarnbardi alt róðrarárið. Jarnbardur var nummar trý á Norðoyastevnu, og síðani hevur hann verið nummar trý í øllum FM kappróðrunum!

**Ólavsøka 2006 – 6-mannafor menn**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Sundabáturin | |
| 2 | Sølmundur | |
| 3 | Jarnbardur | 4:29.22 |
| 4 | Hósvíkingur | 4:34.11 |
| 5 | Gongurólvur | 4:35.00 |
| 6 | Páll Fangi | 4:35.17 |
| 7 | Smyril | 4:37.12 |
| 8 | Víkingur | 4:40.03 |
| 9 | Lómur | 4:42.05 |
| 10 | Kollfriðingur | 4:46.20 |
| 11 | Árnfjarðarbáturin | 4:48.06 |